# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ábyrgd fyri kirkju og kirkjuliði

Tað er torført hjá leikfólki at skilja, at Føroya bispur júst nú sigur seg frá, tí hann er misnøgdur við samskiftið við landsins lógligu politisku yvirvøld. Tað er ófatuligt, at dómpróstur alment hóttir við at siga seg úr kirkjuliga fylgibólkinum. Yvirtøkan av fólkakirkjuni er ein lóglig og demokratisk politisk avgerð. Henda politiska avgerð hevur breiða undirtøku á løgtingi, sum er hægsta vald her í oyggjunum. Tað stendur einumhvørjum frítt at vera misnøgdur við politiskar avgerðir. Embætismenn hava til arbeiðis at seta lógligar politiskar avgerðir í verk. Koma teir til ta niðurstøðu, at politisk avgerð er í stríð við galdandi logir, so eiga teir at siga frá á røttum stað.

Nú eru bispur og dómpróstur jú reint danskir embætismenn og standa bert til svars fyri danskari yvirvøld. Eingin kann forða teimum at mótmæla á hendan hátt, so formliga er tað sjálvsagt í lagi, at teir mótmæla eini lógligari føroyskari politiskari avgerð á hendan hátt. Hetta veri sagt, sjálvt um vit væl vita, at teirra danska yvirvøld hevur góðtikið avgerðina um yvirtøku. Men her er annað og meira í hesum máli. Hetta snýr seg ikki um formalia, men um moral og ábyrgd ábyrgd mótvegis tí kirkjufólki, hvørs ovastu andaligu vegleiðarar bispur og dómpróstur eru.

Føroya kirkja, sum formliga er danska fólkakirkjan í Føroyum, er komin á vegamót, og hon noyðist gjøgnum eina trupla tilgongd eins og allir stovnar, sum verða yvirtiknir. Teir koma tó altíð styrktir úr tilgongdini, og tað fer føroyska fólkakirkjan eisini at gera. Men hetta krevur, at allir avvarðandi partar taka medábyrgd av tilgongdini. Í hesum føri leggur henda tilgongd eina sterstaka og stóra ábyrgd á júst bisp og dómpróst. Teir eru okkara evstu sálarhirðar. Teir skulu nú sum áður leiða og og vegleiða – ikki stinga í sekkin í fornermilsi. Hetta er at sleppa fylginum uppá fjall.

”Betri hon lívdi enn gamalt grót, kirkjan á nesi og tanga..” yrkir skaldið. Fólkakirkjan er stovnur, sum savnar tjóðina. Hetta eru øll samd um, eisini flestu samkomur og fríkirkjur. Hetta merkir sjálvsagt, at kirkjan tolir eitt sindur av hvørjum, men eingin orsøk er hjá ovastu kirkuleiðarum at skapa eina kreppu í eini støðu, har brúk er fyri semju og samanhaldi. Fylgjurnar av eini kreppu nú kunnu gerast ógvusligar, og taparin kann gerast kirkjan og kirkjuliðið. Bispur og dómpróstur, ið eru kendir sum ábygdarfullir og høgt virdir álvarsmenn, eiga tí at hugsa seg væl um. Hetta mál snýr seg ikki um teirra persónar ella embæti. Hetta snýr seg um Guds hús, um fólkakirkjuna og limir hennara – teirra andaligu og sálarligu vælferð.

**Sosialurin**

## Liviumstøður hjá føroyskum og donskum pensiónistum



**NICLAS A. POULSEN,**
formaður í Landsfelag Pensiónista

**Opið bræv til landsstýrismann, Hans Paula Strøm**

Landsfelag Pensiónista takkar Hans Paula Strøm fyri drúgt aftursvar viðvíkjandi muninum í tøkum peningi hjá føroyskum og donskum pensiónistum, ið varð stílað til mín í januar, meðan eg havi verið verið burturstaddur.

Sum formaður fyri landsfelag Pensiónista gleðir tað meg, at fólkapensiónin soleiðis kemur á dags-skrá, og at landsins hægstu brúka tíð upp á tey eldru.

Hetta innslag verður tað seinasta um munin á liviumstøðunum hjá føroyskum og donskum fólkapensiónistum frá landsfelagnum í blaðkjakinum, ið verið hevur seinnu mánaðirnar. Vit vóna, at tað sama góða góða samarbeiði millum landsstýrismannin/Almannamálaráðið og landsfelag Pensiónista heldur fram, og fara vit enn einaferð at boða frá, at landsfelagið framvegis bíðar eftir skrivligum svari upp á skriv okkara frá 11. desember 2006 um avtaluna, ið varð gjørd í 1987 millum føroyskar og danskar landsmyndugleikar, har staðfest varð at "føroyskar pensiónir skulu hava sama disponipla virði sum danskar pensiónir".

Landsfelagið metir framvegis, at fíggjarligu korini hjá føroyskum pensiónistum eru væl verri enn fíggjarligu korðini hjá donskum pensiónistum.

Grundarupphæddin í okkara fólkapension er ikki hækkað ella broytt í 9 ár (síðan 1998), meðan grundarupphæddin í donsku fólkapensiónini - ið harumframt er nøgv hægri enn enn føroyska grundarupphæddin - verður regulerað á hvørjum ári.

Landsfelagið kundi nevnt fleiri dømi, har danskir pensiónistar fáa veitingar og fríar tænastur frá tí almenna, meðan okkara pensiónistar onki fáa. Eg skal tó bert nevna trý dømi.

Í fleiri ár hava fólkapensiónistar í DK fingið fría koppseting móti influensu og allir pensiónistar, ið brúka hoyritól, fáa frí battaríir. Hetta er ókent her. Tó vænta vit, at koppsetingin kemur í lag skjótt aftan á nógvar fundir og skriv í 4 ár.

Danskir fólkapensiónistar, ið nærum bert hava fólkapensión at liva av, fáa almannaveiting nevnd "boligydelse", ið ofta liggur millum 1.500 kr. og 3.000 kr. um mánaðin at gjalda bústaðarútreiðslur/leiguútreiðslur – slíka veiting hava vit sum kunnugt heldur ikki í Føroyum.

Vit gleðast um útgjaldið frá samhaldsfasta, men vit minnast eisini aftur á heystið ella veturin 2005, tá tann politiska samgongan ikki ætlaði at halda avtaluna um hækkan av samhaldsfasta sum avtalað í samgonguskjalinum frá 28. januar 2004. Men sum kunnugt bleiv avtalan um hækkan av sam-haldsfasta hildin eftir nógvar samrøður og nógv trýst frá Landsfelag Pensiónista og kunnu pensiónistar tískil nú gleða seg um tær 1.860 kr. um mánaðin sum fáast úr samhaldsfasta eftirlønar-grunninum.

Eg fari at enda við hesum kjaki her, og vóni sum nevnt áður, at vit kunnu halda á fram við góða arbeiðslagnum og at landsfelagið sum skjótast fær fundarboð frá Almannamálaráðnum - hetta fyri at fáa liviumstøðurnar hjá føroyskum pensiónistum so góðar sum gjørligt og eins góðar sum í grannalondum okkara.

Porkeri hin 14.mars.

## Hugalig grein um nøgdar fiskimenn



**ÓLI JACOBSEN**

Tað var sera hugaligt at lesa samrøðuna í Sosialinum fríggjadagin við ein fiskimann, sum siglir við Betatrolarunum. Meðan stórur partur av tíðindatænastuni snýr seg um fólk, sum eru ónøgd um eitt og annað, lýsti henda greinin ein fiskimann sum er nøgdur.

Hann hevur alt gott at bera reiðaranum. Ikki bert tí undanfarna, men eisini tí nýggja, sum hevur tikið við, nú skipini vóru seld.

Fiskimaðurin var nøgdur við inntøkurnar og við arbeiðsumstøðurnar, nú teir hava fingið kryvjimaskinu.

Fyri meg sjálvan var tað ikki minst áhugavert, at júst manningin á hesum skipum er so avbera nøgd við øll síni viðurskifti….

Sjálvur vil eg bert skoyta uppí, at so góðar umstøður koma ikki av sær sjálvum. Júst í teimum viðurskiftum, sum hesin fiskimaður nevnir, hevur fiskimannafelagið átt sín leiklut.

Inntøkan hjá fiskimonnum er grundað á fleiri høvuðstættir, og tveir av teimum er sáttmáli og fiskaprísir. Í einum komandi Sosiali kemur grein, har sammett verður við hesi viðurskifti í Íslandi. Her verður víst á, at bæði við sáttmála og áseting av fiskaprísum er føroyskir fiskimenn munandi betri fyri enn teir íslendsku.

Við í metingini av inntøkum hjá føroyskum fiskimonnum er eisini teirra skattaskipan, sum FF hevur skaffað teimum, og sum hevur givið meira enn eina hálva milliard seinastu 9 árini. Framvegis gevur hon 60 mill. árliga, hóast allan ágang móti skipanini, sum FF hevur kunnað staðið ímóti.

Afturat hesum kemur, at FF hevur barst fyri at varðveita fiskimøguleikarnar hjá júst teimum fiskimonnum, sum veiða undir Føroyum.

At arbeiðsumstøðurnar eru góðar er eisini úrslit av stríðnum hjá FF at fáa kryvjimaskinur umborð.

Tískil er tað stuttligt, og hugvekjandi, hjá mær sjálvum at fáa hesa váttan frá fiskimonnum sjálvum um, hvussu væl nøgdir teir eru við sínar umstøður, sum FF hevur verið við til at útvega teimum………

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.